# Ímillum foreldraleys og gøtubørn í Kenya

## Ferðafrásøgn frá Malenu, Jens og Josva Meitilberg úr Nakuru í Kenya

FERÐAFRÁSØGN
*Malena, Jens og Josva Meitilberg*



Fleiri okkara ganga við dreymi um at gera okkurt heilt annað, enn hvat ein dagliga tekist við. Í okkara føri hava vit eisini havt tankar, dreymar, og kall í nógv ár, og kunna ídag siga, at tað er ongantíð ov seint, at føra slíkar tankar út í livi, »betri seint enn ongantíð«. Ja, hóast vit eru farin um tey hálvthundrað, so hava vit ført okkara tankar til gerð. Vit fóru úr okkara størvum, fóru frá tí trygga heimliga umhvørvinum til tann meira óvissa, dagliga dagin í Afrika.

Vit eru Malena og Jens Meitilberg úr Tórshavn, vit eiga fýra børn, av teimum er Josva yngstur, hann er 14 ára gamal, og kom hann við okkum til Afrika. Tað er møguliga lættari at fara á okkara aldri, táið ein ikki hevur smábørn, men vit hava sæð og upplivað, at tað er als eingin forðing at fara langt burtur sum t. d. til Afrika, við smábørnum, tað ber eisini til! Við á ferðini hesaferð var Elly mamma Jens, sum vitjaði okkum í tríggjar mánaðir.

### Úr Tórshavn til Nakuru

Vit fóru úr Danmark. 8. januar í ár til Nakuru sum er 4. størsti býur í Kenya við umleið 1 millión íbúgvum. Vit høvdu verið í býnum seks mánaðir áðrenn hesa ferðina, tað var í 03/04, vit arbeiddu tá hjá einum donskum trúboðarahjúnum. Tað er sama arbeiði, vit eru farin aftur til nú.

Ferðin gekk frá Billund-Amsterdam-Nairobi, nógv óvæntað kann henda á einari slíkari ferð. Fyrst vóru vit seinkaði 2 tímar úr Billund, tí vit bíðaðu til illveðrið í Amsterdam skuldi hasa av, so lendast kundi har. Tað var tí við eitt sindur av nervum vit fóru úr Billund. Komin inn á flogvøllin í Amsterdam, runnu vit alt vit kundu, ja teinurin á einum flogvølli er SERA langur. Elly, mamma Jens, royndi sítt besta at fylgja við í hesari rennikapping við tíðina. Men hvat? Fyri stríðið var endin bert, at vit akkurát sóu flogfarið fara avstað beint fyri nøsina á okkum - har var so einki annað at gera enn at sita/liggja/lesa/ganga/sova og gána í 12 tímar til næsta flogfarið fór til Nairobi… Gott var, at vit fingu útflýggjað ókeypis 3. min. telefonkort, so vit kundu ringja til Kenya og siga frá. Vit komu tó fram móð og troytt í øllum góðum til Nairobi, har vinfólk okkara tóku ímóti okkum.

### Mentanarhvøkkur

At koma til Afrika má næstan upplivast. Torført er at greiða frá tí í orðum. Her kan ein uppliva tað nýggjasta mobiltelefonina, nýggjastu tøknina, men eisini í heilt nógvum førum er tað, sum at fara 50 ár aftur í tíðina, ja »kontrastirnar« eru øgiligir. Tað fyrsta, ið møtir einum er lív, larmur, rópan, floytan, tað er sum ein kókandi grýta. At koyra ígjøgnum miðbýin í Nairobi krevur sín mann. Har venda bilarnir allir vegir, øll vilja bara koma fram skjótast møguligt. Tað er tórført at fáa eyga á koyrireglarnar, ja ofta eru tað bert sentimetrar ímillum bilarnar.

Komin heilskapt úr Nairobi, má ein tryggja sær at vera í bilbeltinum, tí annars situr ein aðruhvørja løtu uppi undir takinum, tí vegurin til Nakuru (tekur 2 tímar) er útav lagi ringur, hóast hettar er høvuðsvegurin heilt upp til Uganda. Ja í Kenya eru vegirnir ikki nakað at reypa sær av, men teir lova bøtan á hesum økinum.

Nairobi er at líkna við ein stórbý í Europa, men ikki hava vit koyrt leingi, fyrrenn vit koma til fátækraøkini, sum liggja uttan fyri býin, har fólk búgva í holum, undir plastikki, í moldhúsum, meðan onnur liva í og rundan um stórar ruskdungar.

Bilarnir eru ógvuliga gamlir, serliga eru tað lastbilarnir, teir eru frá 50/60-unum, ja tað er ófatuligt, at teir kunnu haldast koyrandi, ein grund er møguliga, at teir ikki rusta, tí her er heitt, luftin er tunn, og vit ligga á umleið 1.900 meturs hædd her í Nakuru, og langt frá havi og saltvatni.



*Ùr fátækraøkinum*

Áhugavert t er at síggja hesir gomlu bilarnar aftur, sum sóust í Havnagøtum í 60-unum, fyri ikki at tala um bussarnar, teir eru so yvirfyltir mangan, ja har hanga dunkar, plastiíløt, teppir, madrassir, sekkir sum alt er bundið uttaná, tí pláss er ikki inni í bussunum, ja eisini livandi hønir hanga uttanfyri sum viðføri.



*Skúlabørnini bíða eftir mati*

Vit koyra bert ímillum býir og bygdir um dagin, tí vandin er sera stórur at koyra í myrkri. Her eru eingi gøtuljós, so tað er bølaniða. Dagliga hoyra og lesa vit um rán og álop, bæði á fólk og bilar sum verða álopnir og stolnir.

### Handilsfólkini

Í Kenya eru nógvir indarar, sum eru handilsmenn. Her í Nakuru eiga teir eisini fleiri av handlunum. Kenya fekk sítt sjálvsstýri frá Englandi í 1960-inum, men hóast 40 ár eru gingin, so er ikki lætt hjá teimum at fóta sær og stýra sjálvir. Teimum vanta ofta sjálvsálit og árræðið, tíverri halda nógv enn, at tey hvítu duga betri, og eri betri. Hettar er sjálvandi ikki rætt, afrikanarir duga sera væl til nógv ymiskt, men teimum tørva ofta stýring og vegleiðing.

Munurin ímillum rík og fátøk er eisini stórur. Eingin hevur álit á hvørjum øðrum, tí byrgja fólk seg inni við jarn fyri vindeyguni, høgar grótgarðar við brotnum fløskum á, hava vaktarhundar, vaktarfólk _ eingin hevur alit á nøkrum, øll halda at hini stjala, ja sleppur ein einum hundi útum garðin, so kann roknast við, at sjálvt hann verður stolin!! (greiddi ein vaktarmaður okkum frá).

### Fátækradømi

Fyri okkum sum koma úr Føroyum, kann tað tykjast, heilt ótrúligt og óveruligt, at menniskju ídag liva undir slíkum fátækradømi, sum vit hava sæð her í Kenya. Nógv hava ikki fyri mat í munnin.

Arbeiðsloysi er sera, høgt, her er eingin sosialveiting, einki arbeiði _ so er eingin inntøka og eingin hjálp. Ongar pengar til mat, klæðir, húsaleigu, lækna, skúlauniformar, skúlabøkur, og annað. Fyri stuttum hoyrdu vit um eina mammu, sum var deyð frá tveimum smágentum – hon hevði onga familju. Eingin kom tí eftir líkinum, sum tí lá tveir mánaðir á sjúkrahúsinum, (ein skal gjalda fyri at fáa tað útflýggjað og jarðað). Genturnar búðu tí á sjúkrahúsinum, men eftir tveimum mánaðum komu myndugleikarnir uppí, og mamman bleiv jarðað. Síðani bleiv ringt runt til ymisk barnaheim fyri at vita, um ikki onkur kundi taka hesar neyðars gentur, sum vóru 2 og 11 ára gamlar.

Flestu barnaheimini eru yvirfylt, so hesar genturnar fingu ikki møguleika at koma á sama heim.

Ein onnur syrgilig støða: Tey seinastu børnini, ið eru komin inn at búgva hjá okkum, eru eitt systkinapar, drongurin sjey ár og gentan 10 ár. Hesi bæði hava búð púrasta einsamøll í umleið 2 mánaðir. Tey gingu á einum øðrum skúla, men har varnaðust lærararnir, at okkurt var galið, tí børnini komu móð, skitin og svang í skúla. Síðani var funnið útav, at mamman, sum er einlig, var burturblivin, eingin veit enn, hvar hon er, tí búðu børnini einsamøll í húsinum. Hetta eru dømir um, hvussu syrgiligar og ræðuligar umstøðurnar eru hjá nógvum familjum her.